# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum sum vístu samkenslu og hjálpsemi tá góði maður, pápi, verfaðir og abbi okkara

**Harry Jacobsen**
Tórshavn, ættaður úr Sandavági

andaðist og varð jarðaður.

Takk fyri blómur og kransar og takk til øll tykkum, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Fyri tey avvarðandi*

**Lonni, Anders, Gunn og Osvald**
**svigarbørn og abbabørn**

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at okkara høgt elskaði

**Elias Joensen**
Tórshavn
ættaður úr Froðba

andaðist á Landssjúkrahúsinum mánadagin 13. juni 74 ára gamal.

Farið verður úr kapellinum heim í Ebenezer mikukvøldið kl. 18.00.

Jarðarferðin verður úr Ebenezer hósdagin 16. juni kl. 14.00.

*Fyri tey avvarðandi*
**Maria og Lina**

*Tey, ið vilja minnast Elias kunnu lata eina peningagávu til Epileptikarafelag Føroya, konto í Føroya Sparikassa.*

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at

**Hans Clementsen**
Vanliga nevndur Hans í Andarisi, ættaður av Sandi, búsitandi á Seyðisfirði

andaðist 13. juni 85 ára gamal.

Jarðarferðin verður leygardagin 18. juni á Seyðisfirði.

*Vegna tey avvarðandi*
**Jói og Bubbi við familju**

# Danskur skúlaflokkur vitjar 7.b

7.b í Tórshavnar Kommunuskúla hevur í hesum døgum vitjan av einum 7. flokki frá Krogård Skole í Greve kommunu - millum Keypmannhavn og Køge. Tilsamans 22 børn eru í danska ferðalagnum.

Børnini komu til Føroya seinasta týsdag og fara avstað aftur fríggjadagin. Tey hava verið eina viku í Norðoyggjum og búðu í skótahúsunum í Klaksvík.

Sunnudagin komu tey til Havnar, har tey búgva privat. Tey hava vitjað í Nólsoy, í gomlu Havnini, og hósdagin skulu tey undir Vestmannabjørgini.

Í september í ár fer 7.b námsferð til Fraklands, og tá er ætlanin, at tey eisini skulu vitja 7. flokk í Krogård Skole í 5 dagar og búgva privat.

Flokkslærarin hjá donsku børnunum, Helle Houkjær, sigur, at túrurin í Føroyum er ein stór uppliving, bæði fólkið og náttúran. Við at búgva hjá privatfólki hava tey nógvar vinir í Føroyum.




*Føroyskur og danskur 7. flokkur í Vágsbotni týsdagin. 7.b í Tórshavnar Kommunuskúla og ein 7. flokkur frá Krogård Skole í Greve kommunu. Tilsamans 45 skúlabørn*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Jóhan Páll Joensen heldur fram sum formaður



Fríggjadagin 10. juni hevði Føroya Arbeiðsgevarafelag aðalfund. Á aðalfundinum stóðu tríggir av nevndarlimunum fyri vali: Bergur Poulsen, Kristoffur Laksá og Leivur Michelsen. Allir vóru afturvaldir og nevndin er sostatt óbroytt. Hinir nevndarlimirnir eru: Jóhan Páll Joensen, Jón Danielsen, Magni Aarge og Gudmund Mortensen.

Nevndin hevur skipa seg við Jóhan Páll Joensen sum formanni og Kristoffur Laksá sum næstformanni.

*www.industry.fo*

Prógv:

# Hildur Patursson

## Master of Education

Hildur Patursson í Havn hevur lokið meistaraprógv í námsfrøði (Master of Education) á Kennaraháskóla Islands.



**Dagurin**

**15. juni. Valdemarsdagur.** Danski kongurin Valdemar Sigur vann í orrustuni við Reval í Estlandi 1219. Søgnin sigur, at tá illa stóð til, fell reyður dúkur við hvítum krossi niður av himni. 15. juni í 1912 varð kunngjørt, at hesin dagurin skuldi vera almennur danskur flaggdagur til minnis um sigurin við Reval.

Navnið Valdemar er eftir russiska Vladimir, ið merkir *mikil í sínum veldi.*

Dagurin eitur eisini **Vitus**, til minnis um ein 12 ára gamlan drong, sum saman við fleiri øðrum varð tikin av døgum í Róm umleið ár 300. Dagurin er annars merkisdagur í Noregs søgu. Á vitusarmessu ár 1184 vann Sverri úr Kirkjubø sigur í sjóbardaganum við Fimreiti í Sogn og gjørdist einakongur í Noregi.